Import á Torginum í SMS

Toni Dam frá Import sýnir í hendan amerikanska bilin fram á Torginum í SMS í vikuskiftinum

Import hevur sum fyrsta fyritøka í Føroyum gjørt eina samstarvsavtalu við eina stóra bilfyritøku ið fevnir um størsta partin av USA og Canada. Fyrsti bilurin er komin og kann síggjast á torginum í SMS í vikuskiftinum

TÍÐINDASKRIV

Vit kunna bjóða føroyingum at keypa mestsum øll nýggj akfør, sum eru til keyps í Amerika og Canada í løtuni. Vit hava tó valt at byrja við teimum bilunum, ið síggjast á heimasíðuni og í foldaranum ið kann fáast. Hetta tí at vit halda, at her er ein tørvur, og vit vilja heldur ikki taka munnin ov fullan í byrjanini.

Fyrsti bilurin er komin og kann síggjast á torginum í SMS í døgunum 6, 7 og 8 jan.

Í fyrstu syftu er talan um tað, ið amerikanarar kalla "trucks". Tað vil siga: stórir jeepar. Hesir hava væl størri motor og eru eisini størri í vavi enn teir bilar, vit eru von við í Føroyum. Hesu akfør eru tiltikin fyri teirra nógvu orku og góða kvalitet. Av somu orsøk verða tey ofta eisini nýtt sum m.a. neyðsendarakfør um allan heim. Vanligt er at síggja teir sum kranabilar, brandbilar, sjúkrabilar, bjargingarbilar o.s.fr..

Við í prísinum er sjálvandi øll klárgerðing, skráseting o.s.fr. Tað vil siga, at bilurin er klárur at koyra á føroysku vegunum.

Øll akførini eru luksus útgávur. Tað merkir, at akførini hava mestsum alt tað hesi kunnu fáast við av eyka útgerð.

Øll klárgerðing av bilunum, t.d. við ljósum, o.ø., verður framd á góðkendum føroyskum bilverkstaði. Eisini møguligt garanti arbeiði og umvæling verður framd á sama verkstaði.

Bilfígging frá Tryggingarfelagnum Føroyar kann útvegast á staðnum.

Tá tú keypir ein nýggjan bil, bjóða vit hetta sjálvandi við garanti.

Meiri tilfar um bilanar og um Import er at síggja á www.import.fo

Import er ein nútímans fyritøka sum samstarvar við framleiðarar á altjóða marknaðinum. Av tí at Import hvørki hevur pakkhús, lastbilar, vørugoymslur e.a. verða vørurnar fluttar beinleiðis til kundan. Tað merkir, at kundin fær vøruna bíligari, tí hann sleppur undan hesum útreiðslunum.

Størri og størri partar av handilsviðurskiftunum verða greidd á alnótini. Og hetta hevur við sær, at handilsviðurskiftini verða ópersónlig. Tí hevur Import valt at gera nakað burturúr at vísa, hvør persónurin aftan fyri fyritøkuna er. Import roynir at tengja saman tað sambandið ið vit kenna frá keypmanninum á horninum og kundan, við allar teir hentleikar sum nútímans kunningartøkni kann bjóða. Samstundis sum at vit útvega bestu og bíligastu vøruna beinleiðis frá framleiðaranum, óansæð hvar í heiminum hesin er, geva vit keyparanum tann tryggleika, ið liggur í at keypa frá eini fyritøku har tú hyggur í eyguni á keypmanninum.

Endamálið verður altíð at fáa eina støðu har bæði kundin og vit eru nøgd, sigur Toni Dam frá Import.

BURGER KING